*Eg haldi Borg og Benjaminsen vera tveir góðar leikarar, men eg væntaði mær eitt sindur meira av Mr. Samuelsen, sum spælir so sera væl í Keflavík í løtuni*

*Klaus Toppmöller. Væl fyrireikaður landsliðsvenjari hjá Georgia*

SAMBAND
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
tlf 341800



Nýggi maðurin á landsliðnum:

# – Hetta var nakað heilt serligt

**Í sínum fyrsta landsliðsdysti av týdningi fekk Hans Pauli Samuelsen víst nøkur av teimum tingunum, vit vita at hann dugir. Og við boðum frá venjaranum um, at hann skuldi inn at bjóða av, dribblaði víkamaðurin seg framvið trimum mótstøðuleikarum**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hans Pauli Samuelsen er helst bólttryggasti leikarin í landinum í løtuni, og hevur hann verið mest eyðsýndi leikarin hjá EB/Streymi í ár. Hóast hann enn er spildur nýggjur í landsliðshøpi, er lítið at ivast í, at hann verður ein týdningarmikil leikari fyri føroyska landsliðið í framtíðini.

Hann var við fyri fyrstu ferð í venjingardystinum móti Pólandi, og í gjárkvøldið fekk hann seg aftur royndan, tá hann loysti Símun Samuelsen av í øðrum hálvleiki.

Og hóast liðið var aftan fyri við fleiri málum, so vóru boðini frá landsliðsvenjaranum til Hans Paula greið; hann skuldi inn at bjóða av.

– Jógvan Martin segði við meg, at eg skuldi fara inn og gera tað eg dugi best til. Hann vildi hava meg at bjóða av og vera ágangandi, og tað var so tað eg royndi at gera, greiðir Hans Pauli Samuelsen frá, tá vit fanga hann á veg av vøllinum eftir dystin.

Viðhaldsfólkini fingu eisini nakað av tí, tey vita at ungi víkamaðurin dugir so frágera væl. Hann gjørdi eftir boðum landsliðsvenjarans, og megnaði hann at seta bæði ein, tveir og tríggjar mótstøðumenn av ta einu ferðina, umframt at hann legði onkra sera góða avlevering og hevði eina naska málroynd.

Hans Pauli Samuelsen viðgongur tó, at tað ongin løtt uppgáva at koma inn í dystin.

– Tað var ótrúliga hart at spæla, og at koma inn í ein dyst, tá vit eru so nógv aftan fyri, er rættiliga trupult. Vøllurin gjørdi heldur ikki uppgávuna lættari, men tað var ótrúliga stuttligt at sleppa inn í einum dysti sum hesum. At verða skiftur inn og sleppa at vera partur av landsliðnum í dysti á heimavølli er nakað heilt serligt, sigur 21 ára gamli Hans Pauli Samuelsen, sum hóast tapið var fegin um at hava fingið skrásett sín næsta landsdyst á kontoina.



John Petersen, hjálparvenjari:

# Vit vórðu niðurspældir

**Vit vórðu niðurspældir, so einfalt er tað, staðfesti nýggi hjálparvenjarin á landsliðnum, sum sigur seg ikki minnast at hava sæð eitt lið, sum er so væl fyri tekniskt, síðani 6-0 ósigurin fyri Jugoslavia á sinni**

LANDSDYSTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Uttan fyri umklæðingarrúmið hjá føroyska landsliðnum, hittu vit nýggja hjálparvenjaran John Petersen. Undan dystinum hevði Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjarin, boða frá, at tá vit spæla á heimavølli eiga vit fara eftir at fáa stig, men eftir dystin í gjár ber til at staðfesta, at vit ongantíð vóru nær námind nøkrum stigi.

– Vit vórðu niðurspældir, so einfalt er tað, staðfesti John Petersen.



– Teir vóru ov góðir og vit fáa ongantíð frið. Hóast vøllurin var sera keðiligur, megna teir kortini at spæla bóltin skjótt sína millum og lata bóltin víðari fyrstu ferð, og tað vísti veruliga, hvussu gott hetta liðið er, heldur John Petersen, sum vísir aftur, at føroyska liðið kanska undirmetti uppgávuna og mótstøðuna, Georgia fór at geva Føroyum.

### Kundi verði øðrvísi

Longu í teim allar fyrstu minuttunum fingu føroyingar ein risa møguleika at leggja seg á odda, men Christian Høgni Jacobsen buldraði bóltin upp um, eftir at Rógvi Jacobsen hevði stútað hann fyri føtur hansara eftir hornaspark.

– Høvdu vit fingið mál tá, hevði dysturin verið ein heilt annar, tí vit høvdu tá lagt okkum framum, og vita vit ikki, hvussu dysturin síðani hevði tikið seg út.

– Eisin høvdu vit ein møguleika seinni, men heldur ikki tá riggar, og so ber til at staðfesta, at vit ikki vóru nóg neyvir, sigur John Petersen, hjálparvenjari á landsliðnum, sum samstundis vísir á, at vóru føroyingar ikki nóg neyvir, so vóru georgarnir sanniliga effektivir.

– Teir høvdu eini átta kjansir og skora seks mál, sigur John Petersen.

Av hesum seks málum komu trý í hvørjum hálvleiki, men hvussu fyrireikaði landsliðið seg til seinna hálvleik, tá teir vóru aftan fyri við trimum málum?

– Vit fara tá inn fyri at binda um heilan fingur, og royna at avmarka tapið. Tað sæst eisini aftur í útskiftingini vit gera, tá vit seta Paula Hansen inn fyri Claus Bech Jørgensen.

– Og eg haldi eisini at Pauli Hansen gjørdi tað rættiliga gott á defensiva miðvøllinum. Eisini Christian Høgni haldi eg var raskur og ágangandi, og um eg skal nevna nakrar leikarar fram um aðrar, sum stóðu seg væl í dag, so verða tað teir báðir, sigur John Petersen, hjálparvenjari á føroyska landsliðnum.

### Minna um Jugoslavia

John Petersen hevur sjálvur drúgvar royndir frá landsliðnum sum leikari, og hann heldur vit skulu nógv ár aftur í tíðina, fyri at finna eitt lið, sum hevur verið so væl fyri teknikst sum tað georgiska.

– Eg kann ikki minnast at føroyska landsliðið hevur spælt í móti einum so tekniskt sterkum liðið, síðani heimavallardysturin í móti Jugoslavia í 2001, har vit eisini taptu 6-0, sigur John Petersen.

*Georgia var tað liðið, ið varð mett at vera veikasta liðið í bólkinum eftir Føroyar. Hvat kunnu vit so rokna við av dystinum í móti Skotlandi?*

– Tað verður ein heilt annar dystur, og vit plaga vanliga at standa okkum væl ímóti Skotlandi, sigur John Petersen at enda.